# akaðust dúgliga




*Stjórin í Føroya Banka, Jørn Astrup Hansen, handaði Fólkaflokkinum ein málning av fyrrverandi formanni Fólkafloksins, Torstein Petersen, á landsfundinum leygardagin. Føroya Banki hevur leingi havt myndina av Torsteini, men bankin helt tað vera betri, at Fólkaflokkurin fekk myndina, tí Torstein var meir ein politikari enn ein vinnulívsmaður.*
*Mynd: Rúna Sivertsen*



uni fyri.

Landsstýrismaðurin helt einki um, at kvinnur tvørtur um floksmørk vóru farnar at skipa fyri skeiðum fyri at økja um áhugan hjá kvinnur fyri politikki.

- Eg dugi ikki at síggja, hvat kvinnur í Javn-aðarflokkinum og Fólkaflokkinum hava í felag, annað enn at vera kvinnur. Eg haldi, at kvinnurnar í Fólkaflokkinum skuldu heldur nýt orkuna til at greiða fólki frá, hvat tær fyri, heldur enn at samstarva við aðrar flokkar, segði Jógvan á Lakjuni á landsfundinum leygardagin.

Rúna Sivertsen vildi vera við at landsstýrismaðurin í mentamálum hevði misskilt innleggið, men hon tók tað ikki so tungt, at systkinabarnið var ósamdur við henni, tí tað var hon von við, helt hon skemtandi fyri.

### Talaðu at

Kvinnurnar í Fólkaflokkinum vóru rímuliga væl umboðaðar á landsfundinum leygardagin. Fleiri teirra talaðu at viðmerkingunum hjá Jógvan á Lakjuni. Serliga fyrrverandi býráðslimurin í Havn, Katrin Dahl, helt lítið um móttøkuna, sum innleggi hjá Rúnu fekk, og ta skjótu viðgerð evnið fekk á landsfundinum.

- Eg haldi tað er toppmált, at frálíka innleggið skal nærum verða gjørt til láturs. Hvat er hetta fyri ein landsfundur, har vit ikki kunnu kjakast um hetta ógvuliga týðandi evni, spurdi Katrin Dahl.

Bæði Annika Olsen og Elsa í Garði tóku orðið, og róstu Rúnu fyri innleggi. Annika Olsen helt fyri, at tað skuldi ein grundleggjandi hugburðsbroyting skal til - eisini í Fólkaflokkinum - fyri at kvinnur gerast virknari í politikki, enn tær eru í dag. Hon vísti á, at úrslitið hjá Fólkaflokkinum á býráðsvalinum í Havn var eitt tekin um, at tað gongur tann rætta vegin.

- Hyggur tú eftir býráðsvalinum í Havn, so fingu vit nærum 3000 atkvøður. Vit vóru fýra kvinnur á listanum, meðan menninir vóru 13 í tali. Hyggur tú eftir miðaltølunum, so fingu menninir 170 atkvøður í miðal og vit 158, so munurin er lítil, vísti nýggi býráðslimurin hjá Fólkaflokkinum í Havn á.

# kkum frá óskilinum

Fyrrverandi borgarstjórin í Havn, Poul Michelsen, tók eisini orðið. Hann helt tað vera skeivt at smíða eina nýggja lóg, sum skuldi tryggja, at slíkt óskil ikki kom fyri aftur.

- Tað ber snøgt sagt ikki til at løggeva seg frá slíkum. Hatta er ein spurningur um hugburð, moral og etik, segði Poul Michelsen..

Í síni fyrstu setu sum løgmaður, umsat Anfinn Kallsberg kommunumál, og hann helt eisini tað vera skeivt at lógeva á økinum.

- Tú kanst ikki løggeva fyri hasum. Ein, sum ikki virðir sína egnu undirskift, hevur einki at gera í politikki. Vónandi koma tingini í rættlag aftur, og vónandi fær Heðin fólksins dóm á komandi býráðsvali at kenna fyri tað hann gjørdi, segði Anfinn Kallsberg

### Droppið uppbýtið

Fyrrverandi býráðslimurin hjá Fólkaflokkinum í Tórshavnar kommunu, Katrin Dahl, fegnaðist um frálíka býráðsvalið hjá Fólkaflokkinum í Havn, har flokkurin gjørdist størsti flokkur. Hon helt kortini, at tað var nógv fyri, at størsti flokkur skuldi sita fullkomiliga uttanfyri ávirkan, og reisti tí spurningin um vit ikki skuldu ganga burtur frá at býta býráðið í meir- og minniluta.

- Tað hevði verið nógv betur um vit arbeiddu í sátt og semju, og tí haldi eg at vit eiga at ganga burtur frá at býta upp í meir- og minnilutar, helt Katrin Dahl.

Hon skeyt upp eina skipan, har størsti flokkur átti borgarstjórasessin, næststørsti valdi síðan ein formansess í einari nevnd, trið størsti flokkur valdi sær síðan ein formanssess os. fr.

## Landsfelagið hálvt hundrað



*Tað var ein sera rørdur Dánjal Pauli Danielsen, sum helt røðu við døgurðan á 50. landsfundinum hjá Fólkaflokkinum leygarkvøldið. Millum annað greiddi hann frá, hvussu flokkurin varð stovnaður og mintist á allar teir, sum ikki eru millum okkara longur*
*Rúna Sivertsen*

Landsfelagið hjá Fólkaflokkinum fyllir í ár 50 ár. Landsfundurin hjá flokkinum leygardagin á Hotel Hafnia tí hin 50. í tali. Hóast hann er komin nakað til árs var ein av stovnarum landsfelagsins, Dánjal Pauli Danielsen ella Dánjal Pauli í Búðini, sum hann verður róptur, millum luttakararnar landsfundinum hjá Fólkaflokkinum leygardagin.

**.páll**

## Fjaldur politikkur handan búskaparfrøðina

Í seinastu konjukturfrágreiðingini finst Búskaparráðið at politikarunum fyri at lata seráhugamál í vinnuni stýra politikkinum. Bjarni Djurholm er landsstýrismaður í vinnumálum og hann heldur lítið um niðurstøðuna hjá búskaparráðnum, og tað lat hann ongan iva vera um á landsfundinum leygardagin.

- Vit reka í løtuni sama vinnupolitikk, sum vit hava gjørt seinastu mongu árini, men kortini hevur Búskaparráðið einki sagt í sínum árligu frágreiðinum frá 2001 um hesi viðurskifti. Fyri mær at síggja er tað tí einki annað enn fjaldur politikkur handan búskaparfrøðina, sum Búskaparráðið førir fram í sínari niðurstøðu, helt Bjarni Djurholm.

Hvørji politisk ørindi landsstýrismaðurin í vinnumálum heldur Búskaparráðið renna er óivað fyri Tjóðveldisflokkin, tí hetta uppáhald hevur Bjarni Djurholm fyrr havt.

**.páll**

## Leggja valini saman

Í sínum innleggi á landsfundinum hjá Fólkaflokkinum leygardagin nevndi landsstýrismaðurin í mentamálum, Jógvan á Lakjuni, at hann metti tað vera skilagott, at leggja skúlaráðsvalini og kommunuvalið saman aftur fyri at kveikja áhugan fyri skúlaráðsvalunum

Á skúlaráðsvalinum í ár var lítil og eingin áhugi millum foreldrini at luttaka.

**.páll**

## Fáorðaður um útlendingarnar

Landsstýrismaðurin í innlendismálum, Jógvan við Keldu, hevur í sínum fyrsta ári sum landsstýrismaður verið undir hørðum ákoyringum í samband við handfaringina av útlendingapolitikkinum. Hóast evnið hevur eitt heitt epli hjá landsstýrismanninum, so nýtti hann ikki stóra orku undir sínum innleggi leygardagin á landsfundinum til útlendingar heldur hinvegin.

Tað einasta limirnir í Fólkaflokkinum fingu at vita var, at hann arbeiddi við spurninginum.

**.páll**